# - Vit eiga at virðismeta lív okkara í Føroyum

**Fyri góðari viku síðan kom Erna aftur til Klaksvíkar, eftir at hon í nakrar vikur hevði verið í Rumenia við neyðhjálp til tey fátøku**

NEYÐHJÁLP
*Ragnhild Elligsgaard*

**Klaksvík:**
Erna Torleifsdóttir Sigurðsson er 23 ára gomul og búsitandi í Klaksvík. Hon starvast dagliga í mótahandlinum Total og Norðfashion, sum selur mótaklæðir til ung og eldri. Eitt starv og eitt umhvørvið, sum liggur langt frá umhvørvinum hjá teim fátøku, sum eru at finna aðrastaðni í heiminum.

Men tó, hesi liggja ikki langt frá hjartanum hjá Ernu.

Síðst í mars mánaða fór hon, saman við øðrum, ein túr til Rumenia við neyðhjálp til tey fátøku har á staðnum. Ein túrur, sum lærdi Ernu, at vit her heima á klettunum eiga at verða meir takksom fyri alt tað, ið vit hava rundan um okkum.


*Hesi hava sett seg væl til rættis í innbúgvinum, sum júst er komið úr Føroyum*

## Sum ein familja

Erna var til arbeiðis í handlinum, tá ein genta kom inn á gátt, sum júst var afturkomin frá Rumenia. Erna hevði fyrr hoyrt um hesar túrarnar, sum Absalon Matras skipar fyri, men tankin um sjálv at fara hevði ongantíð sligið hana.

- Hendan gentan fortaldi so livandi um alt, ið hon hevði upplivað á túrinum. Og knappliga hugsaði eg: ”Har má eg fara”, greiðir Erna frá.

Hon tosaði við systkinabarn sítt, 19 ára gomlu Elsubeth Danielsen, og hon var eisini beinanvegin til dystin fús.

Síðani ringdu tær til Absalon, sum júst var farin í gongd við at skipa fyri sínum 22. túri til Rumenia, men hann kundi ikki geva teimum eitt heilt greitt svar um, hvørt tær sloppu við ella ikki.

- Vit tosaðu saman fleiri ferðir, men alla tíðina var ein óvissa har, fortelur Erna.

Til endans avgjørdu tær báðar systkinabørnini, at peningurin heldur skuldi nýtast til ein feriutúr suðureftir. Men júst sum tær høvdu tikið hesa avgerð, ringdi Absalon og segði, at pláss hóast alt var fyri teimum báðum gentunum á túrinum.

Tann 28. mars fóru tær báðar so avstað til Rumenia. Við í ferðalagnum vóru eisini Absalon Matras og tvey onnur mannfólk.

- Vit sigldu fyrst við Norrønu til Danmarkar, og síðan koyrdu vit við einum bussi til Rumenia. Túrurin gekk yvir Týskaland, Eysturríki og Ungarn, og tók hann eini trý døgn, greiðir Erna frá.

Men hóast bussferðin var long, so keddu tey fimm seg ikki á túrinum.

- Nei, heldur mótsatt, smílist Erna.

- Vit gjørdust øll sera væl beinanvegin, og prátaðu óvanliga gott saman. Vit kendu okkum sum eina familju, sigur hon.


*Erna Torleifsdóttir Sigurðsson við einum av smáu vinunum, sum hon fekk á ferðini*

## Brølan og rópan

Komin til býin Timisoara í Rumenia vórðu tey innkvarteraði hjá eini íslendskari familju, sum búðu á einum missiónshúsi. Í hesum húsum hevði familjan trúboðaravirksemið sítt, og nakrar ferður um vikuna vóru møtir eisini á skránni.

- Í byrjanini kendu vit okkum ikki so vælkomin, og vóru vit fyri tað mesta úti í bussinum, sum var parkeraður uttanfyri húsini, greiðir Erna frá.

Men Absalon tosaði við fólkini, og eftir hetta lagaði alt seg skjótt til tað betra.

Tó kendi Erna seg ikki heilt trygga hjá hesum fólkunum.

- Tey vóru stak fitt, tað var ikki tað, sigur hon.

- Men eg visti einki um tey áðrenn, og knappliga ein dagin hoyrdi eg brølan og rópan frá møtirúminum. Eg gjørdist rættiliga kløkk, tí tað nærmasta, eg nakrantíð havi verið nakrari tungutali av nøkrum slag, er tá onkur prestur hevur messað í onkrari kirkju, greiðir hon frá.

Hon fór saman við Elsubeth út í gongina at vita, hvat hetta var fyri nakað, og saman komu tær fram til, at eitt møti varð hildið í møtisalinum, har fólk talaðu í tungum.

- Eg helt hetta vera stak óhugnaligt. Eg ivaðist ikki í, at tey róku út illar andar ella okkurt líknandi, sigur Erna.

Men hóast Erna gjørdist illa við av hesi uppliving, so vóru tey búgvandi hjá familjuni alla ferðina. Og sum vit skilja á Ernu, so var tað ikki so heilt galið kortini.

## Absalon væl dámdur

Endamálið við túrinum var at geva teim fátøku í Timisoara ta neyðhjálpina, sum tey høvdu við úr Føroyum.

Timisoara er við sínum 450.000 íbúgvum næststørsti býur í Rumenia, og fleiri av hesum íbúgvum liva á fátækramarkinum. Harav er eisini hópurin av heimleysum gøtubørnum at síggja allastaðni í býnum.

Absalon Matras hevur gjørt fleiri túrar til hendan býin, har hann plagar at býta klæðir, innbúgv og annað út til tey fátæku.

Á hesum túrinum høvdu tey heili 4 tons av neyðhjálp við sær. Hetta var fyri tað mesta klæðir, barnavognar og sengur, sum Absalon hevði innsavnað í Føroyum.

Tann fyrsta dagin í Timisoara koyrdi føroyska ferðaliðið við bussinum út til eitt minni stað, har tey handaðu hesi 4 tonsini víðari til nøkur onnur fólk, sum síðan býttu tað út millum tey fátæku.

- Tað sást væl, at Absalon var kendur millum fólkini har. Líkamikið, hvar vit fóru, so varð hann heilsaður við mussum og klemmum, greiðir Erna frá.

Og at gleðin var stór millum tey fátæku, legði Erna eisini merki til.

- Vit sóu jólaljós í eygunum hjá øllum teimum, sum fingu okkurt. Tey løgdu einki í, um klæðini ikki passaðu ella vóru eitt sindur slitin. Tey hava einki, og tí er alt ein stór gáva hjá teimum, fortelur hon.

Eisini fingu tey pakkar frá ymsum familjum, sum tey so skuldu geva víðari til kenningar í Føroyum.

- Nógv høvdu familju, sum á ein ella annan hátt vóru búsett í Føroyum. Til dømis hittu vit ein drong, sum hevur gentu í Vágunum, greiðir Erna frá.

henda uppliving hevur sett seg fasta hjá Ernu.

- Hann sá so vesaligur út, og vit vórðu øll samd í, at hesin drongur ikki hevði nógv eftir av lívi sínum. Og hann hevur verið í tonkum mínum hvønn dag, síðani eg kom heim, greiðir hon frá.

Føroyska ferðalagið plagdi eisini at fara inn á McDonald at keypa sær okkurt at eta, men eisini har flokkaðust gøtubørnini rundan um tey.

- Á hvørjum matstaði gingu vaktir runt, hvørs uppgáva einans var at reka hesi gøtubørn út. Men hóast teir ansaðu væl eftir, so dugdu børnini óføra væl at sníkja seg inn, uttan at nakar sá. Og so skundaðu tey sær at tøma restirnar, sum fólk lótu standa eftir seg, fortelur Erna.

Komin heim aftur hevur Erna gjørt sær nógvar tankar um alt tað ríkidømi, ið vit hvønn dag eru umgyrd av í Føroyum.

Hon heldur, at vit áttu at verið meiri takksom fyri alt tað, ið vit hvønn dag njóta.

- Til dømis var eg øgiliga kræsin viðvíkjandi mati,


*Absalon Matras tosar við tvey gøtubørn í Timisoara í Rumenia*

## Mugu virðismeta Føroyar

Alla staðni á túrinum møttu tey stórum fátækradømi. Heimleys børn uttan mat og klæðir gingu úti á gøtunum, og tey flokkaðust um hesar fimm føroyingarnar.

- Tað var ræðuligt at síggja, hvat tað er fyri eitt lív, ið tey liva, sigur Erna.

Ein dagin hittu tey ein 19 ára gamlan drong, sum stóð og sniffaði lím, og serliga

áðrenn eg fór. Tað er heilt broytt nú. Nú eti eg tað, sum verður sett á borðið, greiðir hon frá.

Eisini sigur hon, at túrurin hevur lært hana at virðismeta lívið her heima á klettunum.

- Í veruleikanum haldi eg, at øll sum hava nokk av øllum, burdu farið ein slíkan túr, endar Erna Torleifsdóttir Sigurðsdóttir samrøðuna við Sosialin.



# Ein Rósa í miðbýnum

**Sjálvan valdagin lat ein nýggj vakurleikaklinikk dyrnar upp í Klaksvík. Her kanst tú bæði fáa røkt andlit títt, samstundis sum hond eisini verður tikin um tín kropp**

VAKURLEIKI
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:**
Tað er Margee Dam, sum hevur latið vakurleikaklinikkina Rósan upp. Margee er útbúgvin sum kosmetolog og massør, og harumframt hevur hon eisini arbeitt bæði hjá Elisabeth Arden og Lagerfield í Danmark.


*Um 200 fólk stukku inn á gólvið, tá Rósan fyrstu ferð lat dyrnar upp. Margee Dam (í ljósum kjóla) tók væl ímóti*

## Ein dreymur

Margee varð útlærd sum kosmetolog í 1982, og arbeiddi í nøkur ár í Danmark, áðrenn hon kom heim aftur til Føroya. Her lat hon upp handilin Rósan, sum bjóðaði ymsa húðrøkt til viðskiftafólki.

Men saman við teimum tungu árunum fyrst í 90-inum gjørdist tað eisini alsamt tyngri at reka egið handilsvirksemi, og hetti førdi við sær, at Rósan miðskeiðis í 90-inum lat dyrnar aftur fyri seinastu ferð.

Men hetta var tó bert fyribils.

- Eg havi altíð havt ein dreym um at fingið eina professionella klinikk her í Klaksvík. Og nú helt eg so, at tíðin var komin, greiðir Margee frá.

Hon heldur, at samstundis sum tíðirnar eru vorðnar betri, so eru fólk eisini vorðin meiri tilvitað um seg sjálvi.

- Vit hugsa sera nógv um okkara egnu vælveru í dag. Serliga hárið og klæðini skulu vera í lagi, men andlitið hevur ikki minst at siga. Ein sunn húð fær teg at kenna teg væl, og gevur tær eisini størri sjálvsvirðing, sigur Margee.

Í vakurleikaklinikkini Rósan bjóðar Margee alla røkt innan andlit og kropp.

Her kanst tú fáa lagt make-up, tú kanst fáa ymsar voksviðgerðir, tú ført massagu til andlit og kropp og harafturat veitir klinikkin eisini ymsa ráðgeving innan húðrøkt.

## SPA-viðgerðir

Eitt, sum er heilt serligt við Rósuni er, at tú umframt alt hitt, eisini kanst fáa nakrar sokallaðar SPA-viðgerðir.

Ein SPA-viðgerð inniheldur eitt baðikar við heitum vatni, har tú kanst slappa av við hjálp frá ymsum oljum, ið hvør sær hava ymsar eginleikar.

Tá tú er liðug ella liðugur í baðikarinum, so er eitt hav av viðgerðum, ið tú kanst velja at forkela kropp tín við. Fleiri av hesum viðgerðum innihalda algur, sum stramma húðina upp, samstundis sum tær reinsa hana.

Í klinikkini hevur Margee annars lagt seg eftir, at øll amboðini eru av nýggjasta slag. Merkið, ið klinikkin umboðar, er eisini eitt tað mest framkomna innan makeup-heimin í dag.

## Mannfólk víst áhuga

Tá vakurleikaklinikkin Rósan lat dyrnar upp fyri fyrstu ferð sjálvan valdagin, kom hópurin av fólki inn á gólvið.

- Øll hava víst stóran áhuga, og tá avtornaði høvdu eini 200 fólk verið inni á gólvinum, greiðir Margee frá.

Hóast vakurleikaklinikkir oftast leiða tankarnar á konufólk, so vóru eisini fleiri mannfólk á vitjan hendan fyrsta dagin.

Og onkur av teimum hevur enntá bílagt sær tíð frá Margee.

- Og teir skulu sjálvandi eisini verða so hjartaliga vælkomnir, sigur Margee.

Annars sigur Margee, at hon, umframt tilboðini í klinikkini, eisini fer at leggja stóran dent á at taka fólk inn, og síðan læra tey, hvussu tey á bestan hátt kunnu røkta sína húð heima við hús.


*Hølini eru ljós og hugnalig, so nú skuldi borið væl til hjá klaksvíkinum at nýtt eina løtu til fríðkan av holdinum*

# Doris sigur farvæl

**Doris Hansen, sum í átta ár hevur verið formaður í Meginfelag teira brekaðu, MBF, leggur á aðalfundinum í dag frá sær**

FORMANSSKIFTI



Eftir at hava leitt MBF í átta ár leggur Doris Hansen frá sær sum formaður. Tað hendir á aðalfundi felagsins, sum verður í dag.

Hesi seinastu átta árini, meðan Doris Hansen hevur verið formðaur í MBF, hevur felagið ment seg til til at vera eitt væl skipað, viðurkent og álítandi meginfelag, sum er til gangs fyri føroyska samfelagið alt, sigur starvsnevndin í MBF í tíðindaskrivi, sent er út í samband við formansskiftið.

Doris Hansen hevur hesi árini myndað felagið úteftir, og hevur millum annað givið út bók um virki felagsins og søgu teirra, felagið varar av. Søgan um hini, eitur bókin, sum Doris Hansen eisini hevur fingið amenna viðurkenning fyri.

Í samband við, at Doris Hansen nú leggur frá, sær, skipar MBF fyri lítlari samkomu, sum verður í Pálsstovu í Havn eftir aðalfundin, ella klokkan 17 seinnapartin.

Har verður høvi at heilsa bæði upp á farandi og komandi formannin í Meginfelag teirra brekaðu, verður sagt í tíðindaskrivinum.

ej

# Føroyskur rithøvundur heiðraður

**Ebba Hentze fær um vikuskiftið handaða heiðursgávu frá svenskum grunni fyri arbeiði sítt við at umseta norðurlendskar bókmentir til føroyskt, eins og hon eisini hevur umsett føroyskar bókmentir til eitt nú danskt**

HEIÐURSLØN



Rithøvundurin Ebba Hentze verður um vikuskiftið heiðrað av svenska Clara Lachmann grunninum fyri arbeiði sítt at breiða norðurlendskar bókmentir í øðrum Norðanlondum.

Í grundgevingini fyri avgerð síni sigur grunnurin, at Ebba Hentze hevur gjørt stórt arbeiði við at umseta føroyskar bókmentir til eitt nú danskt mál, eins og hon eisini er kend fyri at umseta norðurlendskar bókmentir til føroyskt.

Nevnt verður, at hon hevur umsett bæði norskar og svenskar bókmentir, eitt nú barnabøkur hjá Astrid Lindgren.

Clara Lachmann grunnurin, sum varð stovnaður í 1923, stuðlar norðurlenskum samstarvi, har slíkt finnist. Eitt nú á bókmentarliga økinum.

Grunnurin hevur í ár latið virðislønir og stuðul fyri tilsamans 1,8 millión svenskar krónur. Virðislønin, Ebba Hentze fær, er upp á 50.000, svenskar krónur, og verður latin við ein døgurða, nevndin fyri grunnin er vertur fyri á Hotel Hafnia um vikuskfitið.

ej

# Grulvandi í New York

**Grulvandi eftir gongubreytunum í New York fekk donsk listakvinna tilfar til listaverk, sum nú verða sýnd fram í Listaskálanum í Havn**

FRAMSýNING

Hon fór á náttartíð grulvandi eftir gongubreytunum í New York við pappíri, sum hon legði á breytir og veggir til tess at avmynda stórbýarinnar skitt og grafitti, sum vit um vikuskiftið so kunnu síggja í Listaskálanum.

Pia Schutzmann, hvørs foreldur vóru donsk, er fødd í Bergamo í Italia í 1940 og hevur síðan búð í Ísrael, København, New York og síðan 1989 í Frakland.

Hon gekk frá 1970 til 1977 á listaskúla í København, og gjørdi fyrstu árini vart við seg sum naturalistiskur teknari og grafikari.

Hon hevur málað nógvar andlitsmyndir. Millum aðrar av drotningunum báðum, Ingrid og Margrethu, umframt fleiri øðrum kendum dønum. Eisini hevur hon skrýtt eitt nú yrkingarsøvn við tekningum sínum.

Á framsýningini, sum letur upp í Listaskálanum í dag klokkan 16.00 verða tó ikki vístar naturalistiskar myndir, men nýggir, abstraktir málningar og dømi um spormyndir úr New York, sigur Listasavn Førya í tíðindaskrivi.

ej